# Annað tilfar:



Eitt amboð til fakfólk á dagstovnum og skúlum til at meta um trivnaðin hjá børnum og varnast møguligar avbjóðingar.



**Spælibólkar**
Tilfar til at skipa spælibólkar, har skúlin stuðlar undir felagsskapin, við at næmingar knýta bond við at spæla saman heima hjá hvørjum øðrum. Foreldur hittast stutt, tá tey koma eftir børnum, og koma at kenna hini børnini og teirra foreldur.



**At ferðast á netinum**
Undirvísingartilfar ætlað 4.-6. flokki. Við seks ymiskum tættum innan talgildisbúgving fáa næmingar vitan og amboð til skilagóðan atburð á netinum, og hvussu teir tryggja sítt privatlív.

**PAS-Light**
Undirvísingartilfar, ætlað 10. flokki og miðnámi, ið viðger normar og virði í felagsskapinum. Endamálið er at betra rúsdrekkamentanina, sum longu er partur av felagsskapinum.

SSP
Betri saman

Finn tilfar á ssp.fo









# Samband


**SSP-ráðgevingin**

30 24 80

ssp@ssp.fo

ssp.fo

R. C. Effersøesgøta 26
100 Tórshavn


**SSP-samstarvið**

Á ssp.fo finnur tú SSP-samskipara og SSP-politist í tínum øki. SSP-lærara finnur tú á heimasíðu skúlans.



# Tilboð hjá SSP

SSP | Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi






## Skúlavitjanir hjá SSP-ráðgevingini

*Tilboðini fevna um verkstovu og foreldrafund*

30 min. verkstova
120 min. foreldrafundur

**Knýta bond og skíggjanýtsla (1.-3. flokkur)**
Áherðsla á góðan felagsskap og trivnað við at styrkja verndarfaktorar. Við denti á uppbyggjandi foreldranetverk, felags átøk og avtalur.

90 min. verkstova
120 min. foreldrafundur

**Góðir miðlavanar (4.-6. flokkur)**
Innlit í talgildar vanar og lógarverk umframt at betra um felagsskapin og trygd á netinum. Styrkja foreldranetverk og gera leiðreglur, ið kunnu skapa tryggleika og minka um bólkatrýst.

90 min. verkstova
120 min. foreldrafundur

**Góða ungdómslívið (7.-9. flokkur)**
Hvat upptekur tey ungu? Hvat gevur lívinum innihald? Og hvat kann gera seg inn á trivnaðin? Innlit fæst í teirra støðu við dulnevndum spurnablaði. Arbeitt verður við at útseta byrjanaraldurin fyri rúsdrekka og nikotini við at styrkja verndarfaktorar.





# Vit bjóða hesa undirvísing:

## Skúlavitjanir hjá barnaverndartænastunum

90 min. undirvísing

**Sára og Aleks (6. flokkur)**
Hvat er barnavernd? Og hvussu fáa børn fatur á barnaverndini?
Við tveimum teknifilmum verður greitt frá dømum um vansorgan.





## Fyri fakfólk

**Fráboðanarskylda**
Barnaverndartænasturnar veita frálæru um fráboðanarskyldu, lógarkarmar og mannagongdir til fakfólk innan dagstovn, skúla og viðkomandi stovnar.

Les meira á ssp.fo



## Skúlavitjanir hjá Føroya Politii

90 min. undirvísing

**Ferðslufrálæra (1. flokkur)**
Endamálið er at greiða næmingunum frá, hvussu teir eiga at bera seg at í ferðsluni, bæði til gongu og á súkklu. Eisini fáa næmingarnir høvi at heilsa upp á ein fittan politist.

90 min. undirvísing

**Tryggarumegin á netinum (6. flokkur)**
Hevur til endamáls at læra næmingarnar um góðan atburð á netinum. Herundir at mynd og filmsbrot krevja samtykki. Vit umrøða vinir, tú ikki kennir, happing og hóttanir á netinum.

90 min. undirvísing

**Harðskapur og revsiváttan (9. flokkur)**
Kunning og fyribyrging av ymiskum sløgum av harðskapi: kropsligum, kynsligum, sálarligum, materiellum, fíggjarligum og talgildum harðskapi. Dentur á møguligar avleiðingar við skeivari gerð – fyri ein sjálvan og tann órættaða.

**1-1-2 dagur**
Saman við øðrum skipar Føroya Politi fyri frálærudegi fyri børn í forskúlaaldri um bjarging, eldsbruna, vanlukkur og um at ringja 1-1-2.



